# Indianarar í heila viku



Tað er ikki hissini, sum børnini í skt. Josefs barnagarð í Havn hava hugnað sær hesa vikuna. Síðani mánadagin og til í dag hava tey verið sannir indianarar. Tey hava matgjørt uttandura, har bollar, pylsur og annað er bæði bakað og grillað. Tey hava lært at spæla upp á fínu indianaratrummurnar, eins og tey hava lært nøkur av teimum kynstrum, sum indianarnir máttu duga so meistarliga væl, tá teir skuldu lívbjargað sær í ríku men oftani harðbalnu náttúruni í uppruna-Amerika.

Tá hetta blaðið er á gøtuni, hava indianarnir fingið vikuskiftisfrí, og ivaleyst eru fleiri av foreldrunum tá til ein hugnaligan kaffimun í barnagarðinum, har tey kunnu síggja og hoyra um, hvussu tað er at vera sannur indianari. Og foreldrini hava so eisini lært nakað. Nevnliga at indianarar aloftast høvdu nøvn við beinleiðis tilknýti til náttúruna. Nøvn sum eisini námsfrøðingarnir í barnagarðinum hava verið noyddar at læra seg hesa seinastu vikuna.

Hósdadgin var myndamaður okkara, Jens Kristian Vang, tó á vitjan, og partur av úrslitinum frá frá vitjanini síggja vit her.

-mørk



















